# Inntøkurnar skulu býtast javnari

**Inntøkurnar av skattinum skulu býtast javnaður sundur ímillum kommunurnar og somuleiðis skal skuld hjá teimum ringast staddu kommununum avskrivast, fyri at tær kunnu koma uppundan aftur, heldur Høgni Hoydal**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað verður neyðugt at gera ein útjavningarskipan, har tær kommunur, sum eru illa fyri, fáa ein part av inntøkunum frá teimum kommununum, sum eru betri fyri.

– Og eg haldi eisini, at tað er rætt at avskriva skuld hjá teimum kommununum, sum eru ringast fyri.

Tað sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisflokssins.

Á flokstingunum hjá tjóðveldinum um vikuskiftið segði hann at endamálið við politikkinum eigur at vera at skapa einar størri og eina javnaðari Føroyar, har øll hava somu rættindi.

Hann sigur, at jálvandi fara tað at vera ávís vakstrarøkir í landinum og ein høvuðsstaður, sum dregur at sær.

– Men at sleppa øllum hugsjónum um einar størri og javnari Føroyar, er bæði visjónsleyst og hugsjónarleyst, leggur hann afturat.

Júst tað heldur hann, at Løgmaður og samgongan hava gjørt, fyrst við at lýsa, at stættarstríðið er av og síðani við at siga at hann trúði ikki upp á møguleikarnar hjá útjaðaranum.

– At kapitalurin verður miðsavnaður, har kapitalur er frammanundan, er nakað, sum hendir av sær sjálvum og tað er sostatt ikki neyðugt við politiskum tiltøkum fyri at fáa hetta at henda.

## Sanering og útjavning

Hann heldurs sostatt, at hetta er at geva skarvin yvir og tað er tjóðveldisflokkurin ikki sinnaður til.

Høgni Hoydal minnir á, at floksfelagið hansara, Páll á Reynatúgvu, hevur víst á, at tað snýr seg um at skapa eina nýggja byrjan og at skapa nakrar fortreytir hjá teimum økjunum og kommunum í landinum, sum eru dottin burturímillum í skuldarfellum og sum hava skerdar møguleikar fyri at draga íløgur til sín í mentan og skúlar og trivnaðarmál.

– Og tað snýr seg eisini um at fáa javnbjóðis fíggingarmøguleikar og fortreytir fyri vinnuligum virksemi, sum annars verður sogið úr økjunum.

Høgni Hoydal heldur sostatt, at tað er eitt gott hugskot at sanera skuldina hjá teimum kommunum, sum eru harðast tyngdar av skuld.

– Men treytin skal vera, at kommunur leggja saman og at eitt nýtt uppgávubýti verður gjørt ímillum landið og kommunurnar.

Kortini ásannar Høgni Hoydal, at tað er ikki semja í tjóðveldisflokkinum um hesa ætlanina.

Hinvegin staðfestur tjóðveldisflokkurin, at tað er neyðugt at gera eina útjavningarskipan ímillum kommunurnar, so at skattainntøkur verða býttar javnari ímillum kommunurnar.

- Summar kommunur eru so illa fyri fíggjarliga, at tað hevur skapt ein beinleiðis stættarmun ímillum føroyingar við tað, at tær alsamt noyðast at hækka skattaprosentið fyri at hava ráð at veita tær tænastur, sum er álgt teimum at hava.

Formaður tjóðveldisfloksins ásannar, at hetta er sera torført, men tað má gerast.

Hann sigur, at ein máti er at gera eina útjavning eftir inntøkunum og útreiðslunum í teimum ymsu kommununum.

Tað merkir, at allar útreiðslur til eldri verða koyrdar í eina pulju og hvør kommuna fær so útgoldið eftir, hvussu nógv eldri eru í kommununu.

– Tað merkir, at kommunur við fáum eldri, koma at betala til kommunur við nógvum eldri. Tað sama kann gerast við barnaansing, so at kommunur, sum hava fá nógv fáa útjavning frá teimum kommunum, sum hava fá børn, sigur Høgni Hoydal.



*Inntøkur og útreiðslur skulu býtast javnari ímillum tær ymsu kommunurnar, var boðskapurin hjá Høgna Hoydal á flokstinginum um vikuskiftið*

# Einar javnar, kappingarførar og frælsar Føroyar

**Yvirlýsing frá flokstingi Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy 2006:**



*Tjóðveldisfólk hava sett sær nógv politisk mál, bæði stór og smá*

**Flokstingið staðfestir:**

• at sitandi samgonga hevur sett allan politikk, hugsjónir og framtíðarvisjónir handan politisku leiktjøldini í Tinganesi og uttan fyri ávirkan hjá vanligum fólki.

• at ABC-samgongan hevur bundið føroysku tjóðina niður mótvegis umheiminum við at samtykkja danska lóggávu, ið setur okkum aftur um heimastýrislógina og forðar føroyingum at mennast í altjóða samfelagnum.

• at sitandi samgonga økir um stættamunin millum fólkið og millum ymsu økini í Føroyum við asosialum skatta- og avgjaldspolitikki og vantandi rættartrygd hjá førleikaskerdum fólki, útlendingum og øðrum, ið ikki fáa vart seg mótvegis myndugleikum.

• at ABC-flokkarnir hava ongan sosialpolitikk ella økismenningarpolitikk, ið kann minka um stættamunin í Føroyum.

• at Tjóðveldisflokkurin framvegis skal standa á varðhaldi og tryggja, at sitandi samgonga ikki selir almennar ognir uttan nakra greiða ætlan um, hvussu føroyska samfelagið og fjøldin fær virðisøking og gagn burtur úr sølunum - og tryggja eina ætlan fyri, hvussu peningur frá einskiljingum skal nýtast

Flokstingið fegnast um, at føroyska vinnan og føroyska mentanarlívið kortini gongur beint ímóti politisku ómegdini og roynir at spreingja teir trongu politisku karmarnar og skapa bæði virðisøking og menning í Føroyum.

**Flokstingið vil:**

• at Tjóðveldi sflokkurin vinnur seg aftur í landsins leiðslu sum skjótast og vinnur á politisku líkasæluni

• at Tjóðveldisflokkurin roynir at fáa mest møguliga ávirkan á tey uppskot, ið landsstýrið leggur fram um einskiljingar, so at endamálini um ein sjálvberandi búskap, virðisøking í Føroyum og eitt kappingarført vinnulív í Føroyum, verða rokkin

• at inntøkur frá einskiljingum verða settar í Búskapargrunn og nýttar til íløgur í útbúgving, mentan og gransking

• at Tjóðveldisflokkurin í andstøðu heldur fram at leggja síni alternativu uppskot fram og tryggjar, at tjóðveldispolitikkur setur dagsskránna í Føroyum, m.a. við uppskotum um:

**útbúgving til ófaklærd**

• útjavningarskipan millum kommunur

• almennan fiskidaga- og loyvisbanka, ið kann støðga spekulasjón í fiskivinnuni

• pensiónsskipan fyri øll á arbeiðsmarknaðinum og bøtta fyritíðarpensjón

• sosialpolitisk framtøk fyri førleikaskerd í Føroyum

• rættvísan skatta- og avgjaldspolitikk

• føroyska løgreglu, rættarskipan, útlendingapolitikk og familjurættarlóggávu

• íløgur í miðnámsskúla- og hægri útbúgvingar

• íløgur í mentan og ungdómspolitisk tilboð

**Tórshavn hin 31. mars og 1. apríl 2006**
**Tjóðveldisflokkurin**